# Meðan vit bíða...

**Nógv fundarvirksemi er á Gamla Apoteki í hesum døgum. Hesar myndirnar vórðu tiknar mánakvøldið beint eftir, at Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin vóru blivnir samdir um at fara undir realitetssamráðingar. Tær byrjaðu í morgun klokkan 10 í løgtingshúsinum. Ímeðan er andstøðan í bíðistøðu**

*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Andstøðuleiðarin og formaður í Tjóðveldi, Høgni Hoydal, skrivar sms-boð á gongini uttanfyri flokshølið á Gamla Apoteki*



*Teir tríggir floksformenninir eru nú farnir undir at snikka saman eitt samgonguskjal. Men sambært teimum trimum eru fleiri snávingarsteinar á leiðini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Heini í Skorini hevur samrøðu við formannin í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen, um sannlíkindini fyri einum samgonguskjalið millum A, B og C*



*Hans Pauli Strøm og Jóannes Eidesgaard í flokshølunum hjá Javnaðarflokkinum beint eftir, at ABC-flokkarnir vórðu samdir um at fara í holt við realitetssamráðingar*



*Nývalda tingkvinna Javnaðarfloksins, Helena Dam á Neystabø, í flokshølinum hjá Javnaðarflokkinum mánakvøldið*



*Øll tingmanningin hjá Tjóðveldi var savnað á Gamla Apoteki mánakvøldið. Frá høgru síggjast Bergtóra Høgnadóttir Joensen, Sjúrður Skaale, Torbjørn Jacobsen og Høgni Hoydal. Tey bæði fyrst nevndu er nýval*



*Toppskjúttin á Sambandslistanum, Magni Laksáfoss, saman við formanninum Kaj Leo Johannesen beint eftir, at ABC-flokkarnir vóru lidnir at samráðast mánakvøldið*



*Bill Justinussen og Karsten Hansen hyggja at Degi og Viku uttanfyri flokshøli Miðfloksins á Gamla Apoteki*